# lamenn



*Ikki øll børn eru uppi, tá ið teir koma eftir ruskposunum, men her er so ein smágenta á fótum og fær karamellur frá ruskmonnunum í nissuklæðum*

Teir siga, at hetta er fyrstu ferð, at teir í starvinum sum ruskinnsavnarar hava roynt seg sum jólamenn, og hetta hevur verið eitt stórt upplivilsi.

- Vit hava ongantíð áður í okkara arbeiði møtt so nógvum fólki sum hesa vikuna. Bæði smá og stór hava tikið væl ímóti okkum – og hava verið glað fyri hetta tiltak.

Ruskmenninir í Ryski ynskja at takka øllum, sum hava tikið so væl ímóti teimum – og teir ynskja eisini at takka teimum handlum, sum hava latið karamellurnar.

- At enda ynskja vit øllum Føroya fólki eini góð og gleðilig jól og eitt eydnuríkt nýggjár, siga teir tríggir, sum




*Hýrurin er góður. – Tað hevur verið stuttligt at glett børnini, siga teir tríggir í bilinum, Ryski*



*- Samstarvið við Hampiðjuna letur fleiri dyr út í heimin upp fyri okkum. Fyri tað fyrsta fáa vit atgongd til innkeyp av rávøru til sámiligar prísir, eins og vit hava fingið lykilin til úthurðina á stóru verksmiðjuni, sum Hampiðjan eigur í Litaviu, siga stjóri og nevndarformaður í P/F Føroya Trol, Søren Havmand og Helgi Brekku*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Íslendska Hampiðjan ein av átta partaeigarum í P/F Føroya Trol

**Hósdagin varð felagið, P/F Føroya Trol, stovnað. Partapeningurin er 2,3 miljónir krónur, sum er býttur millum átta partaeigarar – sjey í Føroyum og ein í Íslandi. Íslendski partaeigarin er eftir føroyskum mátistokki ein risi innan trolvirksemi**

FØROYA TROL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fundi á skrivstovuni hjá Poul Hansen, advokati, klokkan 14 hósdagin varð felagið, P/F Føroya Trol, stovnað.

Átta partaeigarar standa aftanfyri felagið, sum hevur heimstað í Vestmanna.

Teir, sum eiga felagið, eru P/F Meðalsbrekka, Vestmanna, Sp/f AHJ 2004, Tórshavn, P/F JFK, Klaksvík, H/F Hampiðjan, Reykjavík, Søren Havmand, Tórshavn, René Havmand, Tórshavn, Herman Brekku, Tórshavn og Jón Brekku, Tórshavn.

Nevndin í felagnum hevur skipað seg við Helga Brekku sum nevndarformanni, Tummasi Christophersen, Hanus Hansen, Herman Brekku, Søren Havmand og einum umboði fyri H/F Hampiðjan sum nevndarlimum.

Søren Havmand er settur stjóri.

### Tríggjar orsøkir

Felagið hevur keypt ein stóran bygning inni á Fjørð í Vestmanna. Gólvvíddin er umleið 1900 fermetrar. Brúk verður ikki fyri øllum bygninginum beinanvegin, og tí hevur felagið gjørt av, at ein partur fyribils verður leigaður út. Tað er Fiskivinnuskúlin, sum leigar hølir í bygninginum, og verður skúlin verandi har, til nýggjur skúli er bygdur.

Stigtakararnir til P/F Føroya Trol siga, at tríggjar orsøkir eru til, at n‡ggja trolvirkið kom at liggja í Vestmanna.

- Tummas Christophersen er sum kunnugt vestmenningur, og hann er sera áhugaður í, at virksemið økist í Vestmanna. Sjálvur eigur hann saman við øðrum fleiri trolarar.

Søren Havmand og Helgi Brekku, stjóri og nevndarformaður, siga, at leitað hevur leingi verið eftir egnaðum hølum til trolvirkið.

- Møguleikar vóru kanska at byggja í Havn, inni á Sundi ella í Kollafirði, men hetta tekur tíð og er kostnaðarmikið. Tá ið Tummas vísti á møguleikarnar í Vestmanna, varð farið í gongd við at ogna sær eini av húsunum, sum standa inni á Fjørð.

Søren og Helgi eru fegnir um, at tað eydnaðist Tummasi at fáa fatur á ognini, sum vestmenningar kalla Snikkaravirkið.

- Bygningurin vísir seg at vera væl egnaður til endamálið, eru teir báðir samdir um.

Ein triðja orsøk til, at virkið liggur í Vestmanna, siga teir báðir er, at bygdin altíð hevur verið ein trolarabygd burtur av.

- Nógvir trolarar hava gjøgnum tíðirnar verið heimahoyrahoyrandi í Vestmanna, og tí eru tað nógvir vestmenningar, sum duga at fáast við trol, siga Søren og Helgi.

### Hampiðjan ein risi

- Sum stigtakarar, eru vit fegnir um at hava fingið tveir so royndar skiparar og vinnulívsmenn, sum Tummas Christophersen og Hanus Hansen, við. Teirra royndir, bæði á sjógvi og landi, eru gull verdar fyri eitt virkið sum hetta. Annars eru allir føroyingarnir í felagnum royndir trolmenn - við undantak av nevndarformanninum.

Stigtakararnir siga, at íslendska fyritøkakan, Hampiðjan, eftir føroyskum viðurskiftum er ein risafyritøka innan trolvirkið við virksemi í fleiri londum.

- Samstarvið við Hampiðjuna letur fleiri dyr út í heimin upp fyri okkum. Fyri tað fyrsta fáa vit atgongd til innkeyp av rávøru til sámiligar prísir, eins og vit hava fingið lykilin til úthurðina á stóru verksmiðjuni, sum Hampiðjan eigur í Litaviu – og í hesum liggja stórir møguleikar, siga stjóri og nevndarformaður í P/F Føroya Trol.

Nakað av fyrireikingararbeiði skal gerast í sjálvum bygninginum í Vestmanna, áðrenn virksemið byrjar, men miðjan verður eftir, at virksemið fer í gongd so smátt hálvan januar.

- Fyrsta bíleggingin um at gera trol, er longu komin, siga Søren Havmand og Helgi Brekku.